## DAGSINS MEINING

# Hvar er útflutningsvirðið?

Tað tykist sum um, at tær politisku kreftirnar, ið høvdu ábyrgd av einum illa funderaðum fíggjarlógaruppskoti seinasta heyst, vilja benda almenna kjakið inn á eina kós, har ein myta skal sementerast um, at nýstovnaða samgongan ynskir hall á fíggjarlógini. Hetta er ikki rætt. Hevði undanfarni fíggjarmálaráðharri lagt eitt uppskot fram í august, ið hekk saman við eftirfarandi inntøkumetingum, so var hetta ikki eitt evni í dag.

Óansæð keksavgjøldum o.ø., so vóru inntøkumetingarnar hjá Karsteni Hansen alt ov høgar. Her eigur ein beinleiðis spurningur at verða til rætta avvarandi: Hví var ikki betri skil í inntøkumetingunum, tá man snikkaði eina fíggjarlóg saman, ið var so tepur, at sjálvt dikterað vinningsbýti og fuglar á takinum í form av væntaðari søluinntøku av bygningum var tikin við?

Her tykist verða eitt mynstur. Tá best stóð til vóru inntøkur landskassans undirmettar. Tá so inntøkurnar vóru hægri enn mett var, so steðgaði eingin á og spurdi, hví tær ikki vóru beinari. Nú kreppa er í næststørstu útflutningsvinnuni vísir tað seg at verða øvugt, har landskassans inntøkur hava verið yvirmettar. Hetta bendir á, at tað er ein grundleggjandi trupulleiki í mátanum, ið inntøkumetingar verða gjørdar uppá. Í hvussu so er kann ikki góðtakast, at inntøkumetingar fella við útvið 10% uppá fáar mánaðar, uttan okkurt heilt serligt hendir.

Hallið á fíggjarlógini skyldast í høvuðsheitinum ikki, at keksavgjaldið o.s.fr. ikki varð samtykt. Hallið er fyrst og fremst eitt úrslit av lækkandi skattainntøkum, ið ikki hava verið tiknar hædd fyri í fíggjarlógaruppskotinum. Óansæð, hvør hevur feilin, so er eitt fíggjarlógaruppskot, ið í stóran stíl yvirmetir bæði vanligan inntøkuskatt og partafelagsskatt, ikki eitt gott fíggjarlógaruppskot.

Eitt er so Karsten Hansen og nú væl og virðiliga punkteraða mytan um, hvussu tungt hann hevur sitið á lokinum, men eitt annað er, um kjakið um føroyska búskapin hevur verið á rætta spori?

Tað hevur verið sera nógv fokuserað uppá BTÚ frá eitt nú Búskaparráðnum, men hvar er útflutningsvirðið í øllum hesum her? Tað tykist sera einfalt, at tá nú føroyska útflutningsvirðið fellir við risastórum millióna upphæddum í alivinnuni, ið hevur staðið fyri útvið ein fjórðing av samlaða útflutninginum, so kann tað ikki koma óvart á nakran, at landskassans inntøkur fella, tá ein tíð er fráliðin. Tá fólk verða uppsøgd, so minka skattainntøkurnar hjá landinum, og tá stór partafeløg fara frá tíggjutals milliónum í yvirskoti til hall, so minka inntøkurnar frá partafelagsskatti.

Spurningurin er, um ikki tíð er at revurdera, hvussu vit hyggja at føroyska búskapinum. Útflutningsvirði er ein faktorur, ið ikki kann ignorerast, hóast tað tykist sum um hetta hevur verið gjørt politiskt og partvíst í ráðgevandi organum seinastu 6 árini. Úrslitið síggja vit í dag við einari fíggjarlóg, ið fer at tátta í hálvari milliard í arvaðum halli, um ikki okkurt munagott verður gjørt. Hetta hall er ikki, tí at nakar hevur ynskt tað. Hetta hall er, tí at metingarnar undir seinasta fíggjarlógaruppskoti eru skeivar. Ikki vakur varði eftir fíggjarpolitikkin hjá undanfarnu samgongu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hevur Tjóðveldisflokkurin einkarrætt ella ongan rætt

**Annita á Fríðriksmørk,**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins*



Oddagreinin í Dimmalætting týsdagin hevst at Tjóðveldisflokkinum. Trupulleikin er, at vit stríðast fyri at fáa umboðan í Norðurlandaráðnum.

### Siðvenjan brotin

Tað, sum vit hava funnist at, er, at sitandi samgonga hevur brotið við ta siðvenju, sum altið hevur verið galdandi síðani Løgtingið fekk umboð í Norðurlandaráðið. Siðvenjan er, at andstøðan og samgongan velja hvør sítt umboð at umboðað Føroyar í Norðurlandaráðnum. Hetta heldur Tjóðveldisflokkurin er ein skilagóð avgerð; sum øll løgting undan tí, sum nú situr, hava tikið undir við. Líka síðani føroyska umboðanin byrjaði í Norðurlandaráðnum.

Men sum tann kritiska røddin, so sigur oddagreinin: "Men Tjóðveldisflokkurin hevur nú einaferð ikki einkarrætt til umboðan í hesum ráð,..." Til tað er at siga, at tað er púra rætt! Men vit vísa bara á og ynskja, at siðvenjan, við at andstøðan velur annað umboðið, verður hildin. Hendan siðvenja má væl eisini kunnað verða galdandi, fyri tað um Tjóðveldisflokkurin situr í andstøðu.

### Hvør velur andstøðuumboðið

Og oddagreinin heldur fram "...og at halda uppá, at Kári P. Højgaard úr Sjálvsstýrisflokkinum ikki er umboð fyri andstøðuna á Føroya Løgtingi, er nú at fara eitt sindur ov lætt um politiska veruleikan, sum hann sær út í dag." Men, tað er altso ikki Kári P Højgaard, sum er trupulleikin. Trupulleikin er, hvør ið hevur valt Kára P Højgaard. Og í hesum føri er tað altso ikki andstøðan, sum hevur valt hann, men tað hevur samgongan gjørt.

### Ein ókritisk rødd er so behagilig

Og tað er ein bangin samgonga, sum treytar sær, at andstøðurøddin í talar, skal verða vald av samgonguni sjálvari.

Við at keypa Sjálvstýrisflokkin upp í valbólkin hjá samgonguni, mátti samgongan rinda við einum nevndarsessi í maktmiklu fíggjarnevndini. Men afturfyri fekk hon so valt, hvør í skuldi umboða landið í Norðurlandaráðnum.

Tí hvat fekk samgongan burturúr við at fara í valbólk við Sjálvstýrisflokkin. Burtursæð frá, at hon misti ein nevndarsess í fíggjarnevndini, so fekk hon sjálvandi tað burturúr, at hon sum samgonga gjørdi av, hvør í andstøðuni umboðaði Føroyar. Og til tað vildi hon sjálvandi hava eina rødd, sum ikki var kritisk mótvegis samgonguni.

### Óli og Kári - týpiskir stríðsmenn

Oddagreinaskrivarin sigur seg síðani ikki skilja, hví Tjóðveldisflokkurin er so harmur um støðuna: "Serliga, tá tað nú eru tveir sokallaðir sjálvstýrisflokkar, sum koma at sita í Norðurlandaráðnum hesa tingsetuna. Var talan um ein sambands- og ein javnaðarmann, so høvdu vit kunnað sett okkum inn í grundgevingarnar hjá Tjóðveldisflokkinum, men tað kunnu vit ikki nú." Nú veit eg ikki um oddagreinaskrivarin heldur, at Óli Breckmann og Kári P Højgaard eru týpiskir stríðsmenn fyri føroyskum sjálvræði.

Men aftur her, so er tað ikki tað, sum málið snýr seg um. Málið snýr seg í stuttum um, hvør í skal velja andstøðuumboðið í Norðurlandaráðið. Skal tað verða samgongan ella skal tað verða andstøðan.

Tjóðveldisflokkurin heldur so, at tað skal verða, eins og tað altið hevur verið; - nemliga, at tað skal verða andstøðan, sum velur sítt umboð, og at samgongan velur sítt.

At samgongan so er ósamd, er so ein onnur søk. At hon harafturat er í meiriluta, og soleiðis kann trumla meiningarnar hjá andstøðuni niður til ein og hvørja tíð; tað kunnu vit so ikki forða fyri.

Men við Tjóðveldisflokkinum í andstøðu verður slíkur politikkur ikki førdur uttan átalu, - tað má samgonguverjan í Dimmu so bara góðtaka, - um hon so góðtekur tað ella ei.x

**VARPIÐ**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Høgni Hoydal søgufalsari

**Johan Samuelsen**



Høgni Hoydal roynir við søguni í hond at bjarga sær sess í Norðurlandaráðnum – sannleikin er tann, at Tjóðveldisflokkurin ongantíð trúði uppá, at tað var møguligt at vinna føroyingum sess har undir núverandi stýrisskipan. Eftir at P.M.Dam, sáli, eftir ótroyttiligt stríð hevði sannført danir um tað skilagóða í føroyskari umboðan í Norðurlandaráðnum, og tað eydnaðist okkum føroyingum at fáa sess í Norðurlandaráðnum í 1969, tá vaknaði tjóðveldisflokkurin við kaldan dreym, og fór at tosa um sjálvsøgd rættindi har, mong ár aftaná, at vit høvdu fingið umboðan. Men tað er ikki tjóðveldisflokkinum at takka fyri okkara umboðan har í dag, Høgni Hoydal! Tað er søgufalsan, so tað forslær!

Vit, sum minnast eitt sindur longur aftur enn til 1998, tá Høgni Hoydal kom inn á føroyska politiska leikpallin, vita um at siga, at tjóðveldisflokkurin ongantíð hevur havt minstu tiltrúgv til, at føroyingar fingu umboðan uttanfyri landoddarnar nakrastaðni við heimastýrislógini í hond – teir settu seg sum vanligt afturá at siga somu søguna aftur og aftur um, hvussu altavgerandi tað er fyri føroysku tjóðina, at vit tóku fulla ábyrgd av hesum landi, fingu suverenitetin, so stóðu allar dyr opnar – hátíðarligir og stórorðaðir hava teir altíð verið, men at føra pragmatiskan politikk í verki so eiðasørir! Allur annar politiskur tanki var at rokna sum politiskt møsn,varð sagt, og so bleiv flent uppá háð um tankarnar og ynskini hjá P.M.Dam í 60-árunum um føroyska umboðan í Norðurlandaráðnum. Tað vistu vællærdu tjóðveldisfólkini betur enn nakar annar, at við heimastýrislógini í hond, so bar onki til – tað sum hevur sermerkt henda flokk hevur verið stirvnaða turkatrúgvin uppá, at bar ikki ALT til, so bar onki til – tyngri enn tyngsta betong at dansa við, og ein ótrúliga frelst politisk meining, sum ongantíð hevur kunnað brúkst til nakað sum helst, tað er veruleikin – heldur ikki hesi seinastu 6 árini í Tinganesi, vit komu ikki úr stað í sjálvbjargnisstrembanini, tí alt ella onki politikkurin ráddi, og førdi m.a. til eitt púra óneyðugt pengaoyðsl hjá føroyska skattgjaldaranum, í eini alment fíggjaðari fullveldispropagandu, sum vit nú koma at gjalda afturfyri í ólukkumáta, pluss alla hina elindigheitina við at kvetta blokkin o.s.fr.

Vit kenna øll til mótstøðuna í tjóðveldisflokkinum móti umboðan á Fólkatingi – har høvdu føroyinar onki at gera, varð sagt, tí føroyskur politikkur skuldi førast heima á Føroya løgtingi, og onga aðrastaðni – aftur hesin ótrúligi heimabeitispolitikkurin og æviga nalvaskoðanin, við púrt ongum sum kemur í nánd av nøkrum, sum hevur við politiskt útsýni, víðskygni og nýhugsan at gera, og enn minni við nøkrum sum helst áliti á føroysku tjóðina og hennara møguleikar í altjóða samfelagnum. Men so royndi Zakarias Vang seg á einum uttanflokkalista til eitt fólkatingsval, sum eitt slag av einum tjóðveldismanni, jú, tað vísti seg at bera hampiliga væl til, og so broytti flokkurin kós, nú var tað knappliga gott latín, og kanska tevjaði onkur nakrar dansakr krónur, tær lukta hóast alt ikki so illa hjá tjóðveldisfólki, heldur ikki í dag!

Og sama er at siga um stóra upplýsingararbeiðið, sum P.M. Dam eftir tógvið stríð fekk danskar politikkarar sum Jens Otto Krag o.a. at skilja, og seinri at stuðla føroyingum í okkara sjálvsøgdu umboðan í Norðurlandaráðnum, sum minsti, men reinasti, norðurlendski svanin – tað kravdi politiskt dirvi og víðskygni og ikki minst eina turkatrúgv uppá, at tað bar til at tamba heimastýrislógina, so at vit vunnu okkara sjálvsøgdu rættindi í Norðurlandaráðnum. Men tað var so sanniliga ikki tjóðveldisflokkinum fyri at takka á nakran hátt, at hetta gjørdist veruleiki – og onki er meira skeivt enn mátin Høgni Hoydal í dag leggur hetta málið fram, har hann situr í andstøðu og má leggja seg á knøini fyri løgmanni Jóanes Eidesgaard og løgtingsformanni Edmund Joensen fyri at sleppa inn í hitan í Norðurlandaráðnum fyri ikki púrasta at vera gloymdur – hvør veit, kanska sleppur hann uttan sjálvur at gjalda hesaferð upp í part í onkrum filmi, hóast alt -, og tosar um siðvenju, at samgonga og andstøða altíð hava verið umboðað í Norðurlandaráðnum. Og at tjóðveldisflokkurin hevur serligar fortreytir fyri at samvinna í ráðnum, kanska framum aðrar føroyskar flokkar – nógv fyri at hoyra frá hesum flokki í dag, sum ongantíð trúði uppá møguleikan fyri føroyskum limaskapi vegna sín nationalistiska betongpolitikk, og sat afturá og flenti háðandi, meðan aðrir stríddist fyri føroyskari umboðan. Tvørturímóti, so sótu teir heima undir homrunum og gorraðu um loysing og fullveldi, og søgdu, at onki bar til at fáa nakran limaskap í Norðurlandaráðnum við heimastýrislógini í hond! Hesin uppgevandi alt ella onki tankin er og hevur verið drepandi fyri alla føroyska luttøku í norðurlendskum og altjóða høpi. Tað er veruleikin Høgni Hoydal, og so kanst tú venda og snara hesum máli til egnan fyrimun, sum tú vilt, men sannleikin er nú einaferð sannleikin, og søguna kanst tú ikki broyta – tað er fyrst og fremst javnaðarflokkinum fyri at takka, at vit fingu umboðan í Norðurlandaráðnum, og als ikki tjóðveldisflokkinum, sum lá bakk, honum so líkt, tá tað snúði ses um at vísa á loysnir og gongdar leiðir !

Og annars visti eg ikki betri enn at Kári P. Højgaard eisini hoyrir til andstøðuna, so hví ikki lata hann sleppa at royna seg í Norðurlandaráðnum? Sjálvandi.

Karaktermorð í nýggjari tið 1:

# Dreyfus og Tønnes tilburðirnir

**Jón Ellendersen**



Alfred Dreyfus (1859-1936) var jødi og kapteynur í franska herinum. Um aldarskiftið (1894-1906) var Frakland skakað av tí, sum seinni fekk heitið Dreyfus tilburðurin. Hesin tilburður avdúkaði rúgvusmikla korruptión í franska herinum og stjórnini og hótti við at býta landið sundur í tveir partar: Fyri og ímóti Dreyfus.

Eg havi fyrr nýtt Dreyfus tilburðin til at lýsa justits- og karaktermorðini, sum Dagblaðið framdi síðst í 70unum og fyrst í 80unum gjørdi móti serliga sokallaðum intellektuellum vinstrahallum, har ímillum William Heinesen. Men púra vanlig menniskju vóru um at fáa tilveruna lagda í oyði av teirra skriving.

Tá klappaðu teir somu menn, sum í dag hava framt tað, sum eg havi valt at kalla "Størsta karaktermorið í nýggjari tíð" í sínar smáu hendur, og herar mínir vóru eymir av øllum klappunum eg fingu frá somu monnum.

Í hesum føri ætli eg at nýta Dreyfus tilburðin til at vísa á, at Anfinn Kallsberg hevur verið fyri einum rættiligum karaktermorði, so vamlisligt og ófrættakent, at verður hesin óhepni streymur í føroyskum politikki ikki støðgaður, er ilt at meta um, hvar vit enda.

### 15. oktober 1894

Dreyfus Kapteynur verður handtikin fyri hásvikagerð orsakað av einum ikki dagfestum og ikki undirskrivaðum skjalið, sum fekk heitið "Bordereauið", har nakrir franskir hernaðarligir loynidómar verða umrøddir. Dreyfus verður ákærdur fyri at hava lati týskinum hetta skjalið.

### 22. desember 1894

Dreyfus verður av krígsrættinum dømdur til lívlangt fongsul, tignarlækkan og burtursøgn til "Djevlaoynna" (Cayanne), har hann gjørdist offur fyri ómenniskjansligari viðferð. Kona Dreyfus og bróðir hennara, Mathieu stríðast samstundis fyri at finna tann ella teir veruliga seku. (Til sammetingar kann eg nevna, at seinasta stigið í "Anfinn Kalssberg tilburðinum" er at hann eisini er "politiskt dømdur" til tignarlækkan.)

### 1895

Á miðjum sumri fær oberstloytnanturin Piquart frænir av, at tað er majorurin, Esterhazy greivi, sum hevur skrivað Bordereauið. Tíanverri setur krígsráðharrin seg ímóti at sakin verður reist av nýggjum.

### 1896

Eitt parísblað skrivar, at Dreyfus als ikki er dømdur við Bordereaunum sum grundarlag, men hinvegin orsakað av treimum loyniligum skjølum "Dossierið", sum eingin annar hevði sæð uttan krígsrætturin. Enn einaferð setur krígsráðharrin seg ímóti at sakin verður endurskoða.

Piquart verður sendur til Afriku, men hevur tó ans fyri at kunna sakførara sín, Leblais um málið. Sakførarin letur vitan sína víðari til senatorin Scheurer-Kestner. Eftirmaður Piqarts, Henry oberstur visti, at Dreyfus var ósekur, men setti seg ímóti eini endurskoðan av dóminum "til tess at verja franska herin".

### 1897

Nýggj prógv verða løgd fram um, at Esterhazy er tann seki, og hesuferð er tað svágur Dreyfus, sum leggur prógvini fram.

Esterhazy verður tó fríkendur 11. januar 1898 á ein ógvuliga forargiligan hátt. Dagin eftir útgevir Emil Zola kenda ákæruritið "J'accuse" (Eg ákæri). Zola verður dømdur at sita í 1 ár, men flýggjar til London. Piqart verður koyrdur úr herinum.

### 1898

Hetta summarið gerst Cavaignac krígsráðharri og roynir hann at leggja eftir Dreyfus við "Dossierinum" sum grundarlag. Eitt av teimum 3. brotunum sigst at hava verið "ógvuliga avdúkandi". Stutt eftir avdúkar generalstaburin, at Dossierið er eitt falsskjal, skrivað av Henry obersti. Henry verður tí handtikin, men tekur lívið av sær í fongslinum. Samstundis flytir Esterhazy til London. Ein samdur krígsrættur avger nú, at Dreyfus skal fyri rættin í Rennes. Samstundis sigur Esterhazy úr London, at tað var hann, sum skrivaði Bodereauið.

Rættarsakin er ein stórur sjónleikur. Sakførarin hjá Dreyfus slær fast, at har var ikki eitt einasta prógv um, at Dreyfus var sekur.

Hóast hetta, so verður Dreyfus dømdur at sita í 10 ár og tignarlækkanin verður styrkt.

Stjórnin bjóðar síðani Dreyfus at verða náðaður og Dreyfus tók av til tess at fáa møguleikar at prógva, at hann var ósekur.

### 1900

Dreyfus fær amnesti.

### 18. juli 1906

Dreyfus verður fullkomiliga fríkendur og gerst majorur í herinum við Piqart sum generalmajori.

Tað tók ellivu ár áðrenn rættvísin sigraði í Dreyfus tilburðinum.

Dreyfus fekk tó ikki loyvi at luttaka í 1. heimsbardaga.

### 1936

Dreyfus doyr í Sveis.

Fyri nøkrum árum síðani tók ein norskur politikari, Tønnes, lívið av sær, tí hann var lagdur undir at hava framt eftirlønarsvik, men seinni kom fram, at Tønnes als ikki var so sekur. Men bøkur (átøkar Skjót Journalistin) vórðu skrivaðar og fjølmiðalarnir válkaðu sær í málinum. Og fylgjurnar vóru ræðuligar: Tønnes tók seg av døgum.

Leiðarin í Altjóða Reyða Krossi, Astrid Nøklebye, tók til orðanna móti hesum, sum bæði hon og onnur mettu sum eitt rættiligt karaktermorð.

– Fjølmiðlarnir forma meiningar og skapa eina almannahugsan. Teir geva fólki eina massiva upplivingav, at her er okkurt álvarsamt á vási. Øll skriva um sín lítla part, men eingin tekur ábyrgdina av heildini í teirr mynd, sum verður manað fram.

(framhald: Jantelógin og forroknilsi hjá Høgna Hoydal)